# Arabo farin til arbeiðis

## Eftir at hava verið trý ár í London og eitt ár í Indonesia, hevði Ben Arabo sín fyrsta starvsdag sum stjóri í Atlantic Petroleum í dag

RÓLANT WAAG DAM

Ben Arabo hevur áður sagt, at tað tók honum ikki langa tíð at umráða seg, tá honum stóð í boði at gerast stjóri í Atlantic Petroleum.

- Nei, eg ivaðist onga løtu. Tað er ein stór avbjóðing at gerast stjóri í einum slíkum oljufelag, men tað er eisini ein spennandi avbjóðing, segði nýggi stjórin í føroysku oljufyritøkuni við Sosialin síðst í aprílmánaði.

Ben Arabo er tó á ongan hátt ókendur á føroyska oljupallinum. Í 14 ár starvaðist hann fyri Amerada Hess, áðrenn hann flutti til London og síðani Jakarta, har hann hevur starvast innan olju- og gassídnaðin.

Nýggi stjórin í Atlantic Petroleum heldur, at við teimum aktivitetum, sum felagið hevur í dag, eru avgjørt vakstrarmøguleikar í framtíðini, og hann er spentur upp at fara til verka.

Við Sosialin fyrr í ár segði Ben Arabo, at hann heldur tað í nógvar mátar vera minst líka avbjóðandi at arbeiða fyri eitt lutfalsliga lítið felag.

– Eisini persónliga er tað nógv meiri nøktandi at røkta og vaksa um eitt lítið felag sum Atlantic Petroleum, sigur Ben Arabo, sum áðrenn stjórastarvið í Atlantic Petroleum var Exploration Business Manager í stóra oljufelagnum Hess.

*rolant@sosialurin.fo*




***Ben Arabo byrjaði í dag sum stjóri á Atlantic Petroleum***

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## *Edva Jacobsen á ting*

Nýggjur tinglimur umboði Sambandsflokkin í skrúðgonguni á ólavsøku.

Edva Jacobsen úr Fuglafirði tók sæti á tingi ólavsøkudag. Hon tekur yvir sessin hjá Jaspuri Vang, sum fyribils hevur sagt tingsessin frá sær.

Jaspur varð fyrr í ár settur í starv sum økisleiðari fyri løgregluna í Suðuroy, og hann metir tí ikki, at hann er førur fyri at røkja bæði størvini og hevur tí valt at fara úr løgtinginum.

Edva Jacobsen hevur áður havt sæti á tingi sum varalimur fyri tingfólk í farloyvi. Hon fekk á seinasta løgtingsvali 227 persónligar atkvøður.

## ÍMORGIN

*11/14 °C*



4-9 m/s — 6-11 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn ella mjørki. Um kvøldið snarar hann í útsynning og sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MIKUDAGIN

*11/14 °C*



3-8 m/s — 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og regn ella sirm av og á. Hitin millum 11 og 14 stig,

## HÓSDAGIN

*12/15 °C*



1-6 m/s — 1-6 m/s

Fleyr til gul av landnyrðingi og yirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul millum útnyrðing og landnyrðing og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 15 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1015 hPa. eystan fyri Ísland viknar. Eitt lágtrýst, 1003 hPa. vestan fyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar týsnáttina.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt í útsynning úr Íslandi kemur spakulilga hendavegin og brúgvalgið við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juli — Fullmáni
29. juli — Mánin longst frá jørðini
3. august — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. aug. | - | 12:15 | 11:15 | 23:49 | 11:30 | - | 01:55 | 14:15 | 02:55 | 15:15 | 10:30 | 23:04 | 09:30 | 22:04 | 00:10 | 12:30 | 01:10 | 13:30 | - | 12:00 | 00:55 | 13:15 |
| 3. aug. | 00:49 | 13:24 | - | 12:24 | 00:04 | 12:39 | 02:49 | 15:24 | 03:49 | 16:24 | 11:39 | - | 10:39 | 23:15 | 01:04 | 13:39 | 02:04 | 14:39 | 00:34 | 13:09 | 01:49 | 14:24 |
| 4. aug. | 02:00 | 14:37 | 01:00 | 13:37 | 01:15 | 13:52 | 04:00 | 16:37 | 05:00 | 17:37 | 00:15 | 12:52 | 11:52 | - | 02:15 | 14:52 | 03:15 | 15:52 | 01:45 | 14:22 | 03:00 | 15:37 |
| 5. aug. | 03:01 | 15:26 | 02:01 | 14:26 | 02:16 | 14:41 | 05:01 | 17:26 | 06:01 | 18:26 | 01:16 | 13:41 | 00:16 | 12:41 | 03:16 | 15:41 | 04:16 | 16:41 | 02:46 | 15:11 | 04:01 | 16:26 |
| 6. aug. | 03:52 | 16:19 | 02:52 | 15:19 | 03:07 | 15:34 | 05:52 | 18:19 | 06:52 | 19:19 | 02:07 | 14:34 | 01:07 | 13:34 | 04:07 | 16:34 | 05:07 | 17:34 | 03:37 | 16:04 | 04:52 | 17:19 |